## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Eystan, 8 til 13 m/s, sum út á náttina hækkar í landnyrðing. Skiftandi skýloft við kavaælum og vátaslettingi. Hitin millum frostmarkið og fýra hitastig.




**Veðrið fríggjadagin og leygardagin**
Norðanvindur, 8 til 13 m/s, onkutíð upp í 15 m/s. Skýggjað við kavaælum og vátaslettingi. Hitin millum tvey kuldastig og trý hitastig.



*Kendasti luttakari á veðurlagsstevnuni í Norðurlandahúsinum í næsta mánaði, er sjálvandi fyrrverandi amerikanski varaforsetin, Al Gore*
*Savnsmynd*

# 32 røðarar á ráðstevnu um veðurlag

**Tað verður eitt lið av vísindaligum, politiskum og vinnuligum úrmælingum, sum fara at leggja fram á altjóða veðurlagsráðstevnuni, TransAtlantic Climate Conference, 7. og 8. apríl í Havn**

**VEÐURLAG**
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Heili 32 røðarar úr øllum norðanlondum, Stóra Bretlandi og USA fara at siga frá sínum granskingarúrslitum, hugsanum og royndum á veðurlagsráðstevnuni.

Nýggjasta navnið á skránni fyrra dagin er íslendski fiskimálaráðharrin Einar K. Guðfinnsson, sum er blivin kendur fyri ein sera avgjørdan fiskivinnupolitikk, ið fylgir tilráðingum frá fiskifrøðingum. Somuleiðis fer Josef Motzfeldt, fyrrverandi grønlendskur ráðharri í uttanríkismálum at røða um, hvussu grønlendigar uppliva veðurlagsbroytingarnar, skriva fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Mest kendi røðarin er sjálvandi fyrrverandi amerikanski varaforsetin, Al Gore. Harafturat fara Bogi Hansen og Rasmus Ole Rasmussen at røða í Norðurlandahúsinum mánadagin 7. apríl.

Seinni dagurin setur fokus á, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka fiskivinnuna við atliti at tilfeingi, veiðu, marknaði og íløgum. Somuleiðis verða orkuspurningar viðgjørdir. Boð verða givin uppá, hvussu orkusparingar kunnu fremjast á sjógvi og landi. Harumframt verða framløgur um tøkniliga nýskapan, sum økir um burðardygga orkunýtslu.

Ráðstevnuan fer eisini at viðgera møguleikarnar hjá Føroyum at gerast ein altjóða vitunardepil innan gransking og menning av loysnum, sum betra um havumhvørvið.

Ráðstevnan hevur fingið dygga undirtøkum bæði frá føroyskari vinnu, politisku skipanini og teimum, sum í dag arbeiða við gransking og menning í Føroyum. Harumframt hevur ráðstevnan vakt ans uttanlands, og NORA og Nordic Innovation Center hava ynskt stuðla og verða partur av ráðstevnuni.

Høvuðsstuðlar til TransAtlantic Climate Conference eru Eik Banki og Føroya Banki. Harumframt stuðla Føroya Lívstrygging, Framtaksgrunnur Føroya, Atlantic Petroleum, Føroya Tele, Injector Trawldoors, SEV, Atlantic Airways og Nordic Innovation Centre.

Tað eru Bitland, Vinnuhúsið, SamVit og NORA sum fyrireika veðurlagsstevnuna. Endalig skrá finst á www.tacc2008.com, har bílegging eisini kann fara fram. Freistin er 4. apríl, um ikki fullteknað er áðrenn.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ






**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst yvir Norskahavinum ferðast suðureftir og grynnist. Køld luft við ælaveðri rekur framvegis móti Føroyum av norðuri og útnyrðingi. Ein hátrýstryggur verður í morgin við oyggjarnar, samstundis sum eitt lágtrýst vestanfyri Skotland grynnist spakuliga.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. 06[00] – 27/3 06[00]. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. 06[00] – 27/3 06[00].
Avfallið higartil í mars: 148 mm






### VESTFALLSKYRRINDI

21. mars Fullmáni
26. mars Mánin longst frá jørðini
29. mars Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. mars | 10.26 | 22.48 | 09.26 | 21.48 | 09.41 | 22.03 | 00.04 | 12.26 | 01.04 | 13.26 | 08.41 | 21.03 | 07.41 | 20.03 | 10.41 | 23.03 | 11.41 | - | 10.11 | 22.33 | 11.26 | 23.48 |
| 28. mars | 11.11 | 23.38 | 10.11 | 22.38 | 10.26 | 22.53 | 00.48 | 13.11 | 01.48 | 14.11 | 09.26 | 21.53 | 08.26 | 20.53 | 11.26 | 23.53 | 00.03 | 12.26 | 10.56 | 23.23 | - | 12.11 |
| 29. mars | - | 12.06 | 11.06 | 23.52 | 11.21 | - | 01.38 | 14.06 | 02.38 | 15.06 | 10.21 | 23.07 | 09.21 | 22.07 | - | 12.21 | 00.53 | 13.21 | 11.51 | - | 00.38 | 13.06 |
| 30. mars | 00.52 | 14.38 | - | 13.38 | 00.07 | 13.53 | 02.52 | 16.38 | 03.52 | 17.38 | - | 12.53 | 11.53 | - | 01.07 | 14.53 | 02.07 | 15.53 | 00.37 | 14.23 | 01.52 | 15.38 |
| 31. mars | 03.00 | 15.23 | 02.00 | 14.23 | 02.15 | 14.38 | 05.00 | 17.23 | 06.00 | 18.23 | 01.15 | 13.38 | 00.15 | 12.38 | 03.15 | 15.38 | 04.15 | 16.38 | 02.45 | 15.08 | 04.00 | 16.23 |


Alt um harmonikur

www.simme.eu